Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um avgerðir og ætlanir fyri menningarsamstarv Føroya, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni við uttanríkis- og mentamálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørjar avgerðir og ætlanir eru lagdar fyri menningarsamstarv Føroya, síðan nýtt Løgting og landsstýri tóku við í september 2019?

2. Eru menningarverkætlanir og -samstørv broytt síðan 2019?

3. Hvør situr í nevndini, sum ráðgevur landsstýrismanninum um menningarsamstarv, eru nakrar broytingar gjørdar í nevndini síðan valið – og um so er, hvørji fólk eru vald og skift út?

4. Hvørjar ætlanir ella samstørv eru stuðlað síðan løgtingsvalið, hvørjar ætlanir eru lagdar og hvørji tilmæli hevur nevndin gjørt til landsstýrismannin og við hvørjum grundgevingum?

5. Hvussu er játtanin brúkt í 2020, og hvussu er ætlanin at brúka játtanina í 2021, 2022 og 2023?

Viðmerkingar:
Føroyar lata enn ikki sum tjóð eina játtan til menningarsamstarv, ið samsvarar við ríkidømi landsins og okkara altjóða skyldur.

Kortini varð játtanin til menningarsamstarv fleirfaldað á fíggjarlógini í árunum frá 2016 til 2019. Játtanin hevur síðan løgtingsvalið í 2019 staðið í stað og liggur á 9 mió. kr. árliga. Spyrjaranum kunnugt hava skiftandi landsstýri havt ráðgevandi nevndir at ráðgeva um, hvussu menningarsamstarvið kann skipast við verkætlanum.

Síðan valið hevur lítið verið at frætt um menningarsamstarv Føroya, og um hvørjar ætlanir og samstørv eru framd og løgd til rættis. Tí verður fyrispurningurin settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi 17. februar 2021

Høgni Hoydal